




**Skírishósdag, Langafríggjadag, leygardagin 15. apríl, 1. Páskadag og 2. Páskadag kl. 12.00 - 22.00 bjóðar Glasstovan hesa Páskamatskrá:**

**Forrættur:** Skeljadjóraragout við lættstoktum djúphavsjákupskeljum

**Høvuðsrættur:** Heilstoktur lambsryggur við rósumarinrómaglace

**Omaná:** Sjokuláta dessert við jarðberum

**Prísur:** 3 rættir kr. 195,-

**Barnabuffet** íroknað sodavatn og ís kr. 59,-

**Sertilboð fyri gisting við morgunmati:**
Dupult kamar kr. 350,-
Einkult kamar kr. 500,-

*Prísurin er galdandi pr. persón/pr. nátt í tíðarskeiðnum 13. - 17. apríl*

Bíleggið á 317500 ella á www.hotelforoyar.fo.

★★★★
GLASSTOVAN
*The Favourite Restaurant*

# DAGVAKT

SMS SØKIR EFTIR

## Vaktarhald í SMS

Tað eru fýra føst vaktarfólk knýtt at SMS, tvær dagvaktir og tvær náttarvaktir.

Høvuðsuppgávan hjá vaktunum er at standa fyri trygdini í húsinum umframt at røkja ymiskar praktiskar uppgávur.

## Uppgávur

Høvuðsuppgávan hjá vaktunum í SMS er at standa fyri trygdini í og uttanfyri SMS. Vaktin hevur ábyrgd av, at viðskiftafólk kenna seg trygg í SMS, bæði hvat víðvíkur ferðslu millum hini vitjandi, og tá tað kemur til brunaskipanir, rýmingavegir, eldsløkkingarskipanir v.m.

Umframt eftirlit við trygdini hevur vaktin ymiskar praktiskar uppgávur, ið serliga eru tengdar at felagsøkjunum í SMS. Hesi uppgávuøkir fevna m.a. um ventilatiónsviðurskiftini, lyfturnar, felags ljósskipanirnar, og eisini hjálpir vaktin til við praktiskum uppgávum, tá tiltøk eru á Torginum. Bygningurin SMS er stórur og rúmar eina rúgvu at hentleikum og tænastum, so roknast kann við nógvum ymiskum praktiskum uppgávum.

## Førleikakrøv

Vit leita eftir persóni, ið er ábyrgdarfullur, væl skipaður, arbeiðssamur og dugir væl við fólki. Ymisku praktisku uppgávurnar krevja samstundis, at viðkomandi, ið settur verður, hevur breiðan praktiskan førleika og handaligt hegni.

## Arbeiðstíðir

Dagvaktin arbeiðir mánadag til sunnudag frá kl. 10.00 til kl. 23.00 og hevur frí aðru hvørja viku.

## Løn

Løn sambært avtalu

## Umsóknir

Áhugaði kunnu senda skrivliga umsókn til SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn, og hon skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl.

Eru spurningar ber til at ringja til Ninnu Vatnhamar, tel. 55 88 88.

SMS

# Tekniskur leiðari til Vestmanna Kommunu

Í sambandi við at Tekniski leiðarin hjá okkum tekur við nýggjum avbjóðingum, verður starvið hervið lýst leyst at søkja.

Tekniski leiðarin hevur dagligu leiðsluna av Teknisku deild hjá kommununi um hendi.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. hesar**
- at hava dagligu umsitingina av øllum tekniskum útbúnaði hjá kommununi.
- málsviðgerð og ráðlegging.
- tilrættalegging og stýring av kommunalum uppgávum – eisini peningaliga.
- at standa fyri útbjóðingum og gera tilmæli til avvarðandi nevndir í bygdarráðnum.
- bygdar- og byggiætlanararbeiði.
- projektering og eftirlitsarbeiði.
- at standa fyri og menna skrásetingararbeiðið av tekniskum leiðingum.

**Vit vænta, at tú**
- er byggifrøðingur, verkfrøðingur, arkitektur ella hevur aðra viðkomandi útbúgving.
- hevur leiðsluroyndir, torir at taka skjótar avgerðir og standa við ábyrgd.
- dugir væl at samskifta við onnur og hevur góðan skriviførleika.
- ert røkin og dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt.
- hevur góðan telduførleika og dugir at brúka m.a. skrivi- og tekniforrit.

**Vit bjóða tær**
- góða løn til rætta førleikan.
- møguleika fyri skeiðum sum varða av arbeiðsøkinum.
- eitt sera fjølbroytt og spennandi starv við góðum møguleikum at menna seg persónliga.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til Teknisku nevnd og borgarstjóran.
Lønar- og setnaðarviðurskifti eru við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg? Send okkum eina umsókn til:

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**FO-350 Vestmanna**
Umsóknir skulu merkjast **"Tekniskur leiðari"**

Umsóknin má verða okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl. 2006. Miða verður eftir at seta starvið frá 1. juni 2006 ella eftir avtalu.

Hevur tú fleiri spurningar? Ring á tlf. 47 01 15 og fá meira at vita um starvið.

*Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.*

*Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.*

Vestmanna Kommuna
www.vestmanna.fo